VIÐMERKINGAR

# Føroyskur uttanríkis-, verju- og gjaldoyrapolitikkur

Kristina Háfoss



**Verður tað ein trupulleiki fyri einar sjálvstøðugar Føroyar at reka uttanríkis-, verju- og gjaldoyrapolitikk – eins og danski statsministarin í samrøðu í SVF og føroysku bløðini vildi verða við ?**

**Fogh í Føroyum**

Danski statsministarin var sera væl fyrireikaður og greiður á vitjan síni í Føroyum. Anders Fogh Rasmussen hevði sett sær fyri at fáa ein meira positivan tóna partanna millum og má hetta sigast at verða eydnast til fullnar. Vónandi fer framtíðar samstarvið at verða eins væleydnað.

Eg kundi - saman við politisku flokkunum og stórsta partinum av føroyska fólkinum - gleðast um boðini, men gjørdist tó minni glað, tá ið Fogh í samrøðu í SVF og síðan eisini í føroysku bløðunum, kom inn á framtíðar uttanríkis-, verju- og gjaldoyrapolitikk Føroya.

**1) Uttanríkispolitikkur**

Fyri tað fyrsta nevndi Fogh, at tað fór at gerast sera trupult fyri eitt lítið land sum Føroyar at reka uttanríkispolitikk – eitt nú, tí tað var ov dýrt at stovna umboðsstovur v.m. í útlondum.

Her fer Fogh tó skeivur. Tá ið umræður umboðsstovur gera lítil lond – sum Føroyar – avtalur við størri lond, ið hava umboðsstovur kring heimin soleiðis, at føroyingar móti gjaldi, kunnu nýta hesar umboðsstovur eftir tørvi. Harvið gerst kostnaðurin sera avmarkaður.

Hartil kemur, at Føroyar longu í dag hava egnar umboðsstovur í Danmark, Belgia og Skotlandi. Gerast Føroyar sjálvstøðugar hevði møguliga verið skilagott við einari umboðsstovu á asiatiska og einari á amerikanska marknaðinum av tí, at hesir marknaðir eru sera viðkomandi fyri føroyskt vinnulív.

Uttanríkisøkið er stórt og fjølbroytt. Við uttanríkispolitikki fylgja atlit, ábyrgd og uppgávur.

Føroyar hava í dag eina servitan á økinum og uppbyggja støðugt eina enn betur vitan – m.a. umvegis Uttanlandsdeildina á Løgmansskrivstovuni – og somuleiðis umvegis stýrini, ið javnan samstarva við útlendskar myndugleikar. Eitt nú kann nevnast, at Føroyar longu í dag standa fyri beinleiðis samráðingum við ES og aðrar fiskivinnutjóðir um handils- og fiskivinnuavtalur og eisini eru omanfyristandandi umboðsstovur settar á stovn.

Hartil skal nevnast, at Danmark í dag umboðar Føroyar í flest øllum altjóða felagsskapum. Danmark fer sjálvsagt fyrst og fremst at hugsað um egin áhugamál, og eru hesi ikki altíð í samsvar við føroysk.

Sum dømi kunnu nevnast, at Danmark eitt nú hevur atkvøtt ímóti stórhvalaveiðu í altjóða hvalaveiði felagsskapinum – ímóti ynskjum hjá føroyingum. Eisini hevur Danmark forða fyri góðum avtalum viðvíkjandi útflutningi av føroyskum rækjum til ES og somuleiðis hevur Danmark lagt seg útí eina trílandaavtaluna millum Føroyar, Ísland og Grønland á fiskivinnuøkinum.

Einar sjálvstøðugar Føroyar vilja kunna umboða føroysk áhugamál, tá ið umræður uttanríkismál.

**2) Verjupolitikkur**

Somuleiðis vísti Fogh á, at verjupolitikk fór Føroyar eisini at hava trupult við, tí ov dýrt er at hava eina hernaðarliga verju.

Eisini hesum viðvíkjandi talar Fogh ósatt. Fogh er so sera greiður yvir, at Føroyar sjálvsagt ikki fara at byggja upp nakra hernaðarliga verju. Føroyar fara í samstarvi við eitt nú NATO at fáa tað verju, ið er neyðug, skuldi kríggj brostið á.

Verjupolitikkur Føroya fer – eins og verjupolitikkur Danmarkar – í stóran mun at verða stýrdur av teimum størru tjóðunum í heiminum. Føroyar fara óivað í framtíðini – eins og í dag – at luttaka í altjóða verjupolitikkinum hjá vesturlendsku londunum.

Sum sjálvstøðug tjóð fer Føroyar at fáa lut í inntøkum frá NATO í sambandi við at føroysk jørð verður nýtt til verjuendamál og samstundis vil Føroyar eisini fáa møguleika fyri at sláa seg fram til loysnir, sum uttan iva m.a. fara at innibera nýggjar samstarvs- og vinnumøguleikar á nógvum økjum og harvið øktar inntøkur.

**3) Gjaldoyrapolitikkur**

Eisini vísti Fogh á, at lítil lond sum Føroyar hava sera trupult við at hava egið gjaldoyra. Tískil metti Fogh tað verða best fyri Føroyar at verða undir donskum myndugleikum hesum viðvíkjandi.

Men Fogh veit, at tá ið tað kemur til gjaldoyrapolitikk, so kemur sjálvstøðugt gjaldoyra sjálvsagt ikki uppá tal í Føroyum. Hetta hevur heldur ongantíð verið ætlanin og fara Føroyar óivað um ikki so nógv ár at nýta evruna sum gjaldoyra.

Tað vil altíð verða ein fyrimunur at nýta sama gjaldoyra sum tey lond, ið vit innflyta frá og útflyta til – hetta til tess at spara transaktións- og váðakostnað.

ES er heilt klárt nógv tann stórsti marknaðurin hjá føroyska vinnulívinum og tað er tískil sjálvsagt, at Føroyar - um ætlanin er at nýta annað gjaldoyra enn donsku krónuna - fara at nýta evruna sum gjaldoyra. Tað hevur ljóðað at danir aftur skulu til fólkaatkvøðu viðvíkjandi evruni um nøkur ár, og gongur europeiska gjaldoyrasamstarvið sum ætlað, fer danska krónan óivað at verða skift út við evruna tá. Í so fall fara føroyingar óivað eisini at nýta evruna.

Nú komið er inn á gjaldoyrapolitikk skal nevnast, at besta loysnin fyri altjóða handilin hevði verið eitt felags altjóða gjaldoyra fyri allar tjóðir. Hetta hevði í stóran mun gjørt tað léttari at keypt og selt vørur tvørturum landamørk, og hevði hetta gjørt kappingina størri til gagns fyri allar borgarar og samfelagini sum heild.

Vit síggja eitt nú, at lond í suðuramerika fáa alsamt størri áhuga fyri at nýta US-dollar sum gjaldoyra og somuleiðis er stórur partur av Europa farið at nýta evruna. Hetta eru tiltøk, ið kunnu verða stig á leiðini fram ímóti einum felags altjóða gjaldoyra. Eitt tílíkt gjaldoyra vil tó ikki koma uppá tal tey fyrstu mongu árini.

**Megna Føroyar ikki uppgávuna ?**

Sum nevnt omanfyri er danski statsministarin fult upplýstur um, at føroyski framtíðar uttanríkis-, verju- og gjaldoyrapolitikkurin ikki fer at fáa teir trupulleikar, ið Fogh nevnir og mugu útsagnir Fogh's tískil tulkast sum ein roynd at fáa føroyingar at trúgva, at vit ikki eru førir fyri at klára okkum á nevndu økjum.

Hetta er ikki saklig upplýsing – og eiga føroyingar ikki at taka hesar útsagnir fyri fult. Sjálvsagt kunnu Føroyar eins og aðrar smátjóðir – í samstarvið við aðrar tjóðir - klára seg væl og menna seg á uttanríkis-, verju- og gjaldoyraøkinum.

Greitt er, at verju- og gjaldoyrapolitikkur í stóran mun verður avgjørdur av størstu tjóðunum í heiminum, men gerast Føroyar sjálvstøðugar er møguleiki fyri at velja loysnir, ið hóska seg betur til føroysk áhugamál – eitt nú viðvíkjandi hvat samstarv vit ynskja við NATO og hvat gjaldoyra vit ynskja at nýta.

**Føroyar á altjóða leikpallinum**

Nógvar smáar tjóðir virka kring heimin í dag. Fólkatal og landafrøði hevur ikki longur avgerandi týdning fyri, hvørt ein tjóð klárar seg á altjóða leikpallinum.

Í og við at alheimsgerðin er við til at opna landamørk, handils- og samstarvsmøguleikar v.m. er alheimsgerðin í stóran mun við til at fremja áhugamálini hjá smáum tjóðum.

Føroyar liggja landafrøðiliga í eitt av heimsins ríkastu økjum. Vit hava eitt sera vælútbúgvið fólk – og harvið stórt vitunarligt ríkidømi. Vit hava stórt ríkidømi í havi og sannlíkt eisini í undirgrundini. Vit hava eitt framkomið, nýmótans og kappingarført vinnulív. Vit hava eina fólkaræðisliga stjórnarskipan og virða øll mannarættindi.

Vit hava harvið alt, ið krevst til tess at gerast ein sterk sjálvstøðug tjóð, ið fer at verða viðurkend á altjóða leikpallinum. Harvið fáa vit ríkar møguleikar fyri at samstarva við onnur lond og altjóða felagsskapir, ið nú viðvíkjandi okkara uttanríkis-, verju- og gjaldoyrapolitikki.

Niðurstøðan er, at Føroyar hava allar fyritreytir fyri, at reka uttanríkis-, verju- og gjaldoyrapolitikk á høgum støði. Tískil fer danski statsministarin skeivur, tá ið hann ikki metur hetta verða møguligt fyri einar sjálvstøðugar Føroyar.

# Aftursvar til Heðin Mortensen

Jógvan Jacobsen



Heðin Mortensen sigur við vanliga borgaran,at Løgmaður og Varaløgmaður leggja høvdið á vanliga borgaranum á blokkin við at skerja heildarveitingina av flatlondum Eg vil minna Heðin Mortensen á, at tað sum føroyiskir politikkarar hava at klandrast um, eru danskir pengar. Hesin klandurin eigur lívið í Sambandsflokkinum. Vóru danskir pengar ikki, so var einki í Sambandsflokkinum, og Javnaðarflokkurin var kanska ein veruligur javnaðarflokkur. Tað er kanska hetta, sum er ein trupulleiki fyri Heðin Mortensen.

Heðin Mortensen sigur í sama umfangi, at føroyingar hava rætt til blokkin, av tí at vit eru í einum samveldi. Men føroyingar hava ongan rætt til danskar pengar. Um so var, at Føroyar vóru í einum samveldi, einum veruligum felagsskapi, so var nakað annað. Men nær hava vit sæð ein føroyskam forsætisráðharra í donsku stjórnini? Nær hava vit sæð ein grønlendskan? Nær hava vit sæð ein føroying ella ein grønlending sum ráðharra í tí sonevnda danska samveldinum, ella ríkisfelagsskapinum ella hvat tey finna uppá at rópa tað. Danmark er ein eindarstatur, ikki eitt samveldi ella ein felagsskapur. Vit fara ongantíð at síggja ein føroying ella grønlending í donsku stjórnini, so leingi sum Danmark er ein eindarstatur. Danska grundlógin er skrivað til Danmarkar, ikki til okkara.

Heðin Mortensen sigur eisini í sínum lesarabrævi, at samferðslukervið í Føroyum er útbygt av tí at vit eru í einum sonevndum ríkisfelagsskapi. Lat meg minna Heðin á, at føroyska samferðslukervið varð fyrst útbygt av føroyskum pionerum og seinni fór hetta í sjálvsveiggingar, og føroyingar fóru at útbyggja eftir donskum fortreytum. Hetta sendi okkum so logandi á heysin. Vit mugu læra av okkara feilum og útbyggja Føroyar eftir føroyskum treytum og føroyska búskapinum. Einki annað er rætt, og hetta má ein sambandsmaður duga at síggja.

Heðin Mortensen endar lesarabræv sítt við at siga, at blokkurin er ein rættur, so leingi sum vit brúka okkara sjálvsavgerðarætt at vera í ríkinum. Føroyingar hava ongantíð brúkt sjálvsavgerðarættin til at gerast ella vera ein partur av danska eindarstatinum. Eingin politikkari kann siga, at nú brúka vit sjálvsavgerðarrættin til at vera eitt hjáland. Føroyingar hava einaferð brúkt sjálvsavgerðarrættin. Hetta hendi 14. september 1946. Danska stjórnin og Sambandsflokkurin trumfaðu eina fólkaatkvøðu ígjøgnum, sum eingin annar vildi hava. Eftir atkvøðuna vildu danska stjórnin og Sambandsflokkurin ikki vita av fólkaræðinum. Sambandsflokkurin vildi ikki vilja vita av hesari fólkaatkvøðu eftir hetta. Og nú sigur ein sambandspolitikkari alment, at vit brúka sjálvsavgerðarrætt okkara til at vera "í ríkinum".

Eingin flokkur og eingin politikkari kann einvíst gera av, at nú brúka vit okkara sjálvsavgerðarrætt uttan at spyrja fólkið eftir. Poul Nyrup Rasmussen helt seg kunna gera tað, men sjálvsavgerðarrætturin hevði staðið órørdur. At koma við slíkum útmeldingum er sera ódámligt og eg vóni, at Sambandsflokkurin ger sær greitt, at hann ikki einvíst kann gera av, nær sjálvsavgerðarrætturin er brúktur. Antin góðtekur Sambandsflokkurin at fólkið vildi hava loysing 14. september 1946 ella góðtekur Sambandsflokkurin, at sjálvsavgerðarrætturin stendur órørdur.

Eg vóni, at Heðin Mortensen og restin av Sambandsflokkinum skilja tey orðini, eg her havi skrivað og taka tey til eftirtektar.



# Sama gjald, ymsar tænastur

**Býráðsumsitingin hevur gjørt av, at foreldur í Tórshavnar kommunu yvir ein kamb skulu gjalda eins gjald fyri vøggustovu- ella barnagarðspláss. Tó so – gjaldið fyri vøggustovupláss og barnagarðspláss er ikki tað sama. Men hvussu kann býráðsumsitingin gera hetta, tá tænastan ikki er eins á øllum stovnum. Her verður hugsað um til dømis heitan mat, blæður og annað**

ANSINGARPLÁSS
*Ingrid Bjarnastein*



*Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur, at foreldur hava ikki ráð at velja og vraka, sum teimum lystir. Tey eru noydd at taka av tí, sum teimum verður bjóðað*

– Grundin til, at hetta varð sett í verk er, at vit hava nógvar stovnar í Havnini, og tað er stórur munur á kostnaði. Foreldur hava tí spurt, hví tey skulu gjalda eitt gjald, tá onnur gjalda eitt minni gjald, og eisini býráðsumsitingin undraði seg yvir henda spurning, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Stovnarnir fáa í dag eina fíggjarveiting frá kommununi, sum stovnurin síðan ræður yvir sjálvur. Hugt hevur verið eftir, hvussu nógv kostar at reka stovnin, og síðani hevur stovnurin fingið eina fíggjarveiting at arbeiða út frá. Kostnaðurin á vøggustovu- og barnagarðsplássum er roknaður út frá miðalrakstrarkostnaðinum fyri allar stovnarnar í Havn, og tey flestu gjalda tað sama sum áðrenn, tó nøkur eitt lítið sindur minni og nøkur eitt lítið sindur meira.

**Ikki sparitiltak**

Jan Christiansen sigur, at tørvurin á ansingarplássum í Havn er langt frá nøktandi, og tí hava foreldur ikki »ráð« til at velja og vraka sum teimum lystir. Tænastustøðini eru tó ymisk. Summir barnagarðar bjóða heitan mat til børnini og summir ikki, onkrar vøggustovur hava blæður til børnini, og á summum ert tú noyddur at hava blæðurnar við sjálvur.

– Tænastustøðnum ræður stovnsleiðarin síðani fyri, sigur Jan Christiansen.

– Tað er stovnsleiðarin, sum ger av, hvat peningurin í fíggjarveitingini verður nýttur til. Vit brúka sama politikk við skúlunum og tað vísir seg at rigga fínt.

Við skúlunum var fyrr soleiðis, at um skúlin ikki brúkti alla fíggjarveitingina, fekk hann tað minni í fíggjarveitingini næsta ár. Hetta førdi við sær, at tá komið var út í desember mánaða valdi skúlin at brúka restina av fíggjarveitingini til eitt hvørt, næstan bert fyri at brúka hana, fyri at ikki fáa eina skerda fíggjarveiting næsta árið. Hetta er nú broytt. Peningurin, sum loypur av fyri fíggjarárið, bæði hjá barnagarðum og skúlum, fellur ikki aftur til býráðið, men stovnurin sleppur at hava peningin sjálvur, uttan at fíggjarveitingin næsta árið minkar.

– Soleiðis kunnu stovnsleiðararnir sjálvir prioritera, hvat peningurin verður nýttur til. Tað eru teir bestu stovnsleiðararnir, sum fáa pening at loypa av, og ger hetta, at tað verða stovnsleiðararnir, ið duga best at nýta peningin, ið teimum er tillutaður, ið kann veita hægsta støðið, sigur Jan Christiansen.

– Henda avgerðin um at øll foreldur skulu gjalda eins annaðhvørt fyri vøggustovu- ella barnagarðspláss kom fyri at sleppa undan ónøgdini millum foreldrini sjálvi. Nú hava barnagarðarnir fingið ein karm at halda seg innanfyri júst sum tað er við øllum øðrum her í samfelagnum. Gularótin er so, at peningurin, ið loypur av fyri fíggjarárið fellur til stovnin, og sum stovnurin síðani kann nýta sum honum lystir, uttan at fíggjarveitingin árið eftir minkar. Sigast skal eisini, at hetta er ikki eitt sparitiltak hjá býráðnum. Miðalgjaldið er tað sama, tó soleiðis, at summi foreldur gjalda eitt sindur meira og summi eitt sindur minni.

# Brutu inn á skúlan

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Seks bilførarar vórðu tiknir »á hjólunum«, sum sagt verður, fyri rúsdrekkakoyring í Havnini um vikuskiftið. Hetta vil siga, at teir eru tiknir meðan teir koyrdu.

Eisini fekk løgreglan eina fráboðan um, at ein koyrdi fullur, og endaði hetta við einum ferðsluóhappi á Frælsinum í Havn, har fulli bilførarin rendi á tveir bilar. Ongin fólkaskaði stóðst av óhappinum

**Innbrot á skúlan við Ósánna**

Í Klaksvík hevur var eitt innbrot á skúlan við Ósánna fríggjanáttina. Her var talan um tveir ungdómar, sum høvdu brotið seg inn á skúlan har teir vóru farnir í holt við tveir óstappaðar fuglar. Eisini høvdu teir tømt ein pulvursløkkjara á skúlanum.

Vakthavandi á politistøðini í Klaksvík sigur, at onki álvarsligt er hent, men at pulvursløkkjarar dálka illa, so talan verður helst um eitt størri vaskiarbeiði á skúlanum. Innbrotið er tó ikki tað fyrsta av slagnum, tað er komið fyri fleiri ferðir fyrr, at brotið hevur verið inn á skúlar, og hava tey málini verið uppklárað. Løgreglan sigur seg hava slóðir at ganga eftir hesum málunum viðvíkjandi, men tó hevði tað verið gott um onkur visti okkurt at siga løgregluni í Klaksvík.

– Tað er onkuntíð komið fyri, at skúlin hevur verið noyddur at lata aftur í nakrar dagar tí talan hevur verið, men tað er talan helst ikki um í hesum førum, sigur vakthavandi á politistøðini í Klaksvík at enda.

# Dansifrøi 30 ár á baki

**Dansifelagið Dansifrøi hevur leygardagin 26. januar 30 ár á baki. Í hesum sambandi verður skipað fyri stórari dansiframsýning í Norðurlandahúsinum**

DANSUR
*Ingrid Bjarnastein*

Tey, ið hava hug, kunnu gleða seg til hálvan annan tíma av dansi leygardagin, tí tá skipar Dansifrøi fyri stórum dansitiltaki í Norðurlandahúsinum. Hetta verður gjørt í sambandi við, at felagið fyllir 30 ár tann 26. januar.

Dansifrøi heldur til í Studentaskúlanum í Hoydølum, har tey í vetur hava vant við seks holdum í allan vetur. Tey seks holdini eru øll á ymsum støði frá nýbyrjarum til heilt vandar dansarar.

– Ógvuliga hugaligt er at síggja, at eisini heilt ung fólk eru áhugað í at dansa, sigur Erling Jørgensen, formaður í Dansifrøi.

– Tey ungu hugna sær ógvuliga væl. Kanska eru tað eitt sindur meira gentur enn dreingir, men dreingirnir eru eisini nógvir, og er tað sjálvandi gleðiligt at síggja. Tey ungu eru mest áhugað í at dansa Rock ´n Roll, ella tað, sum vit kalla eingilskan dans, men tað vísir seg, at teimum dámar eisini væl at dansa teir gomlu dansirnar tá tey eru fyrst komin í gongd.

Til tiltakið í Norðurlandahúsinum hevur Rhoda Rubeksen eitt eyka hold, og eisini hevur Sharon Weiss eitt hold við livandi tónleiki.

Jógvan Martin Mørk hevur vant trý av holdunum í vetur, meðan Joan Bláfoss hevur tikið sær av teimum ungu.

Dansitiltakið byrjar klokkan 15.00 og eru tað seks hold, ið koma at framføra ymsar dansir. Atgongumerki á 80 krónur eru at fáa í Norðurlandahúsinum.



*Dansifrøi skipar fyri stórum dansitiltaki í Norðurlandahúsinum komandi leygardag*

*Savnsmynd*

# Innbrot í Sparikassanum

INNBROT
*Ingrid Bjarnastein*

Náttina til sunnudagin kom Eysturoyar Vaktarhald fram á tveir menn, sum vóru í gongd við at bróta inn í Føroya Sparikassa í Saltangará. Klokkan var gott 5.30 á morgni, tá Eysturoyar Vaktarhald uppdagaði, at tveir menn vórðu í holt við at taka eina rist frá til ventilatiónina í kjallarahæddini hjá Sparikassanum. Teir vóru væl ávegis til at koma inn, tá vaktarhaldið fekk eyga á teir. Teir báðir menninir uppdagaðu tó, at teir vóru sæddir, so teir hildu til beins.

Løgreglan í Runavík veit tó, hvørjir menninir eru; teir eru ikki tiknir enn, men fer hetta at henda skjótast gjørligt.

Revsingin fyri at bróta inn á peningastovnar kann vera heilt frá bót til fongsulsrevsing uppá fýra ár um talan er um heilt grov innbrot. Tó var talan ikki um nakað álvarsamt innbrot um vikuskiftið, tí menninir vóru jú ikki komnir inn í sparikassan.

– Brotsmenninir eru tveir kenningar hjá løgregluni her í Runavík, so teir kunnu vænta sær eina hampuliga revsing, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.